## Mondeo nr. 1 í Danmark



Við 5.648 seldum bilum bleiv Ford Mondeo mest seldi persónbilur í Danmark í 2001, nr. 2 bleiv Peugeot 206 og Peugeot 406 varð nr. 3. Í vár koma Mondeo á marknaðin við einum 2.0 TDCi turbodiesel motori við commonrail innspræning og 130 hk.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai og HM fótbóltur



Eftir at hava selt tilsamans 1.6 milliónir bilar í 2001, er málið, ið Hyundai Motor Co. hava sett sær, 1.9 milliónir bilar í 2002. Ein orsøk til øktu søluna, vænta teir, verður, at teir eru høvuðssponsorar til HM í fótbólti.

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

## Vælnøgd við Toyota



Dansk Kundeindeks hava gjørt eina kanning av, hvussu nøgdir kundarnir eru við 8 bilmerkir og bilinnflytarar í Danmark. Toyota lógu á odda við einum loyalitetsprosenti uppá 82.

*Kelda: Bil Magasinet*

**ÚT AT KOYRA**

# Miðalferðin hevur stóran týdning fyri ferðslutrygdina

Í mong ár eru nógvar royndir gjørdar bæði at hækka og lækka hámarksferðirnar, og hvørja ferð sýna úrslitini, at lækkar tú hámarksferðirnar, so lækkar eisini miðalferðin á vegnum, vanlukkurnar verða færri, og talið á teimum, ið doyggja og verða álvarsliga skadd, minkar eisini. Men hækka vit hámarksferðirnar, verður úrslitið tað øvugta. Miðalferðin á vegunum økist, vanlukkutalið økist, og fleiri fólk doyggja og verða ávarsliga skadd.




*Á myndini sæst til dømis at um vit økja miðalferðina við 10 km/t, so:*
- *økist talið á teimum deyðu 50%*
- *økist talið á teimum skaddu 38%*
- *økist talið á vanlukkum 22%*

*Kurvarnar á hesi myndini eru úrslit av nógvum royndum og kanningum av bygdavegum, sum gjørdar eru í Svøríki og øðrum londum. Lagt kann verða afturat, at royndir, sum m.a. eru gjørdar í Danmark og USA, staðfesta, at henda kurvin er álítandi.*




*Tølini á hesi myndini eru gjørd eftir svenskum kanningum. Tað eru óhugnalig tøl teir eu komnir fram til. Um ferðin bleiv minkað við 10 km/t kundu 140 mannalív verði spard og umleið 1500 færri høvdu fingið álvarsligan skaða.*

*Kelda: Petur J. Sigvardsen RFF*

# Toyota Crown tikin av vindi í Gøtu í 1973



**Í myndaárbókini, "Árið ið fór" frá 1974, stóð hendan myndin frá november 1973, tá ið rættuligt ódnarveður var kring landið. Hendingin fór fram í Gøtu, har ein Toyota Crown, ið stóð parkeraður aftanfyri ein Volvo 144, varð syftur upp um Volvobilin og lendi á einum garði og á takinum á bilinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Um miðjan november var rættuligt ódnarveður kring landið. Á flogvøllinum í Vágum, har mált varð uppí vindmegi 15, fór tekjan av nýggja garagubygninginum. Á Oyggjarvegnum fuku fleiri bilar út av vegnum, og í summum bygdum fóru tekjur omanav húsunum. Bæði í Hoyvík og í Gøtu rapaðu tvey nýliga reist hús. Í Gøtu hendi eina náttina, fyrst í desember, eitt sjáldsamt óhapp, tá illveður aftur leikaði í. Ein Toyota Crown stationvognur varð av eini hvirlu lyftur upp á ein garð og bóltaði síðan runt, so hann kom at liggja á takinum og hvíla niður á Volvobilin, sum stóð beint frammanfyri, tá óhappið hendi. Volvobilurin hevði harafturímóti ikki flutt seg. Sum myndin vísir, er tað ikki nakar lítil bilur, ið soleiðis er viðfarin. Ein Toyota Crown vigaði umleið 1300 kg.

Myndaárbókin, Árið ið fór, kom út 11 ferðir, frá 1970 til og við 1980. Útgevari var Hjalti Skaalum.

*Kelda: Myndaárbókin "Árið ið fór"*



Búskapur og vinna:
## Sevryba var dýrt

Danska skipasmiðjan Ørskov Christensen í Frederikshavn, sum mánadagin boðaði frá 350 uppsagnum, stendur til at missa ein part av umleið 300 mió. krónum, sum skipasmiðjan eigur til góðar eftir samstarv við reiðaríið Sevryba.

Ørskov lat Sevryba tveir stórar trolarar, sum eru goldnir, men hevur hinvegin ikki fingið pengarnar fyri tveir aðrar trolarar, sum vórðu bygdir til sama felag. Hesir báðir trolararnir hava verið á sølulista hjá fleiri skipsmeklarum, men enn hevur eingin víst teimum tann neyðuga áhugan. Teir báðir fyrru trolararnir eru eisini til sølu.

Á Ørskov siga tey, at skipasmiðjan uttan iva fer at missa pengar upp á allar fýra trolararnar. Skipasmiðjan fekk upprunaliga trygd frá russiska statinum, men tað vísti seg, at hendan trygdin var einki verd.

## Stórur lønarmunur

Verkfrøðingar, sum arbeiða hjá norsku kommununum, krevja nú at fáa meiri í løn, tí lønarlagið hjá kommununum er langt niðan fyri lønarlagið í tí privata vinnulívinum.

Sum dømi verður nevnt, at meðallønin hjá teimum kommunalu verkfrøðingunum liggur um 300.000 norskar krónur um árið, meðan verkfrøðingarnir í privatu vinnuni liggja um 420.000 krónur í ársløn. Hjá sivilverkfrøðingunum er meðal árslønin um 500.000 norskar krónur í privatu vinnuni.

Verkfrøðingarnir, sum arbeiða hjá kommununum halda hendan stóra munin vera órímiligan, og teir krevja nú, at okkurt verður gjørt við málið. Hendir einki, verður trot á verkfrøðingunum í kommununum, siga teir.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísraelskir hermenn sýta fyri at gera hertænastu



*Fyri fyrstu ferð hava ísraelskir hermenn tikið seg saman at mótmæla framferðini hjá herinum í teimum palestinsku økjunum. Teir siga, at harðskapurin elvir til harðskap, sum hedan myndin úr Jerusalem eisini er eitt gott dømi um*

*Mynd: Reuters*

**60 hermenn í ísraelska eykaherinum boða í blaðlýsing frá, at teir vilja ikki gera hertænastu í teimum hersettu palestinsku økjunum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Hóast teir 60 menninir eru í eykaherinum, hava allir drúgvar royndir í vanliga ísraelska herinum, og umleið helmingurin eru yvirmenn. Í lýsingini, sum stendur í størsta ísraelska blaðnum, Yedioth Ahronoth, boða menninir frá, at teir sýta fyri at fara til Gaza-geiran og á Vestara Áarbakka sum hermenn, tí ísraelski herurin fremur ágang ímóti tí palestinska fólkinum har og eyðmíkir tey.

- Vit fara ikki at gera hertænastu hinumegin ta Grønu linjuna við tí endamáli at herseta, flyta fólk, oyðileggja, forða, drepa, svølta og eyðmíkja eitt heilt fólk, stendur m. a. í lýsingini hjá hermonnunum. Grøna linjan, sum sipað verður til, er markið, sum varð ásett í vápnahvíldaravtaluni í 1967.

### Eitt mark er

Teir báðir menninir, sum hava tikið stig til lýsingina, hava sagt, at teir ætla at fáa einar 500 hermenn afturat at skriva undir lýsingina.

- Vit hava øll okkara mark, sigur David Zohnstein, sum er annar av stigtakarunum, og hann leggur afturat:

- Tú kanst vera góður yvirmaður, men brádliga fært tú boð um at gera ymiskt, sum tú ikki átti at fingið boð um at gera so sum at skjóta fólk, at steðga sjúkrabilum, at oyðileggja hús, sjálvt um tú veitst, at fólk búgva har, sigur tann 28 ára gamli Zohnstein, sum er loytnantur í eykaherinum.

Hann og vinmaður hansara, Yaniv Itzkovich, vita at siga frá tilburðum, har ísraelskir hermenn hava skotið palestinsk børn, sjálvt um tey á ongan hátt hóttu hermenninar.

Ísraelska herleiðslan hevur hvassliga fordømt lýsingina hjá teimum 60 hermonnunum.

- Tað er lógarskylda at gera tænastu í ísraelska herinum, og tað ber ikki til, at eykahermenn sjálvir skulu gera av, hvat teir skulu gera, sigur herleiðslan.

### Ikki teir einastu

Hetta er ikki fyrstu ferð, at ísraelskir hermenn sýta fyri at gera tænastu í herinum ella í ávísum økjum. Men hetta er fyrstu ferð, at so nógvir eykahermenn hava tikið seg saman og alment hava boðað frá sínari misnøgd.

Síðani ófriðurin millum ísraelsmenn og palestinar tók seg upp fyri 16 mánaðum síðani, hava einir 500 ísraelskir hermenn sýtt fyri at gera hertænastu í teimum hersettu økjunum, men alment hevur einki verið at frætt um tað. Umleið 40 hermenn eru endaðir í fongsli.

Eygleiðarar í Ísrael siga, at blaðlýsingin hjá eykahermonnunum er enn eitt tekin um, at partur av ísraelska fólkinum ivast í framferðini hjá herinum í teimum hersettu palestinsku økjunum, og at tey flestu hóast alt vilja hava góð viðurskifti við palestinararnar.

Í síðstu viku almannakunngjørdi blaðið Haaretz eina samrøðu við Yigal Shochat, sum er fyrrverandi flogskipari í ísraelska flogvápninum. Í samrøðuni mælti hann hermonnunum frá at gera tænastu í teimum hersettu økjunum, eins og hann mælti flogskiparunum til at sýta fyri at bumba palestinskar býir.

Úr Norðurlondum:
## Illveður kostaði 135 mill.

Hóast illveðrið, sum herjaði stóran part av Vesturevropa seinasta vikuskiftið, ikki var so ringt í Danmark, kostaði tað donsku tryggingarfeløgunum einar 135 mill. krónur.

Hetta er tó lítið samanborið við ódnarveðrið, sum rakti Danmark tann 3. desember í 1999. Tá noyddust tryggingarfeløgini at rinda 14 mia. krónur í endurgjaldi fyri skaðar. Ta ferðina fingu tryggingarnar fráboðan um 400.000 skaðar, men í illveðrinum um vikuskiftið vóru skaðarnir millum 20.000 og 25.000.

Eitt fólk doyði í Danmark í illveðrinum. Tað var ein týskari, sum datt niður av takinum á einum orkuverki í Esbjerg. Sambært myndugleikunum hevði maðurin ikki band á sær.

## Fleiri skiljast

Alt fleiri norsk hjún velja at fara hvør til sítt. Í fjør var talið á hjúnaskilnaðum í Noregi 10.700, og tað var 400 fleiri enn árið fyri.

Sambært blaðnum Vårt Land er talið á hjúnaskilnaðum vaksið um alt landið við undantak av Oslo og teimum norðastu landspørtunum. Í onkrum landsparti var vøksturin í fjør heili 30 prosent.

Hjúnaskilnaðirnir í Noregi hava ikki verið so nógvir í tali síðani 1994. Í 1995 minkaði talið, men síðani 1999 hevur tað aftur verið veksandi.

Í Ráðnum fyri familjuvernd halda tey, at fólk leggja minni og minni í, um tey liva sum hjún ella sum sambúgvar, og at giftarmál var hægri í metum fyrr enn nú.